# Arbeiddu svart

Kanningar hjá skattaveldinum í Norðurnoregi í fjør avdúkaðu, at umleið 80 prosent av útlendingunum, sum arbeiddu í byggivinnuni, rindaðu ikki skatt í Noregi. Somu kanningar vístu, at útlendingarnir høvdu fingið umleið 600 mió. krónur í løn, sum teirra norsku arbeiðsgevarar høvdu hildið uttan fyri skattaskipanina. Skattavaldið sigur, at 36 mál eru latin ákæruvaldinum. Onkur arbeiðsgevari hevur fingið forboð fyri at hava fólk í arbeiði næstu fýra árini.



*Nógvir útlendingar arbeiddu svart í Noregi í fjør (Mynd: Nordlys)*



*Nú sleppa íslendskar fiskavørur tollfrítt á kanadiska marknaðin (Mynd: Vísir)*

# EFTA fingið fríhandil við Kanada

**Nýggi sáttmálin gagnar millum annað íslendskum vørum á kanadiska marknaðinum**

SAMHANDIL
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Fríggjadagin var ein hátíðarløta í sveisiska býnum Davos, har umboð fyri EFTA og Kanada skrivaðu undir ein fríhandilssáttmála. Í fyrsta umfari umfatar sáttmálin handil við vørum, men partarnir hava avtalað, at innan trý ár skulu teir fara undir samráðingar um at víðka sáttmálan, so hann eisini kemur at umfata tænastur.

Saman við fríhandilssáttmálanum hava EFTA og Kanada tingast um ein serligan sáttmála um landbúnaðarvørur. Eisini her komu partarnir á mál við sáttmála, sum varð undirskrivaður fríggjadagin. Báðir sáttmálarnir koma í gildi, so skjótt teir eru góðkendir í Kanada og teimum fýra EFTA-londunum, sum eru Ísland, Noreg, Sveis og Liktinstein.

## Fyrimunur fyri Ísland

Íslendsku fjølmiðlarnir siga, at nýggi fríhandilssáttmálin er ein fyrimunur fyri Ísland. Millum annað hvørvur tollurin á øllum fiskavørum, landbúnaðarvørum, klædnavørum, fiskakørum og øðrum vørum úr plasti, sum íslendingar framleiða og útflyta. Tað sama er við maskinum og tøkni. Afturfyri fáa kanadiskar ídnaðarvørur og ávísar landbúnaðarvørur tollfría atgongd á íslendska marknaðinum.

Íslendingar vænta eisini, at íslendskar fyritøkur fara at fáa sær virksemi í Kanada. Í fjør skrivaðu Ísland og Kanada undir ein sáttmála um loftflutning, sum millum annað gevur íslendskum flogfeløgum møguleikar at flyta fólk, farm og post í Kanada.

Á fundinum í Davos samdust EFTA-londini um at fara undir samráðingar við India um fríhandil. Partarnir hava havt innleiðandi tingingar, sum endaðu í fjør, og londini eru samd um at gera ein fríhandilssáttmála, sum skal umfata bæði vørur og tænastur.

# Kvotuskerjingin bjargar íslendska toskastovninum

**Avgerðin hjá íslendsku stjórnini at skerja toskakvotuna var neyðug og fer at bjarga stovninum**

FISKIVINNA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

**- Tað er eingin ivi um, at toskastovnurin undir Íslandi er viknaður tey seinastu árini, og at støðan er sera álvarssom. Kortini haldi eg ikki, at vit fara at koma í somu støðu sum kanadiumenn við toskinum við Nýfunnaland.**

**Stjórin á íslendska havrannsóknarstovninum, Jóhann Sigurðjónsson, viðgongur, at stovnurin mælti stjórnini til at skerja toskakvotuna munandi fyri at forða fyri, at íslendingar skuldu koma í eina støðu, sum minti um tað, sum hendi við Nýfunnaland. Har gekk heimsins største toskastovnur til grundar av ovurveiði og broytingum í umhvørvinum fyri smáum tjúgu árum síðani, og 15 ára veiðibann hevur ikki fingið stovnin aftur á føtur.**

**- Vit eiga at hyggja at tí, sum hendi í Kanada tá og teirri sannroynd, at toskastovnurin har hevur ikki fótað sær aftur. Tá vit sóu, at toskastovnurin undir Íslandi byrjaði at vikna, mæltu vit til munandi niðurskurð í kvotuni fyri at forða fyri, at nakað tilsvarandi skuldi henda her. Vit vænta eisini, at stovnurin fer at veksa aftur, sigur Jóhann Sigurðjónsson við Vísir.**

**Stjórin íslendska havrannsóknarstovninum ásannar, at viðurskiftini undir Íslandi eru ikki heilt lík teimum í Kanada, tí har hava broytingar í vistfrøðini havt munandi størri ávirkan á gongdina enn undir Íslandi.**



*Íslendski toskurin kundi fingið somu lagnu sum toskurin við Nýfunnaland, bleiv einki gjørt (Mynd: Vísir)*